

*Neytakonur. F.v. Laurentsa, Anna Sofía inni í Stovu, Marin Kristianna, Súsanna í Klá, Lotta í Sjúrðarstovu (arbeiðskona úr Oyndarfirði) og Marin yviri í Stovu.*
*Hesa og aðrar av myndunum hava vit fingið loyvi at taka úr Gjáar-bókunum hjá Petur J. Sigvardsen.*

nógv tá í tíðini, tá 600 kr varð roknað sum ein vanlig inntøka hjá fiskimonnum. Hetta vóru nokk eisini góð fiskiár, og tað lá eisini væl fyri hjá pápabeiggja sum skipara at fáa fisk.

## Nóg mikið at gera heima

Tá pápi var burtur, lá alt arbeiðið við hús á teimum, sum vóru heima, og her var jú nóg mikið at gera fyri hvørja hond. Men tá skipini komu aftur av Suðurlandinum, plagdi pápi at seta epli niður og skera torv. Alt annað var arbeiðið hjá konufólkinum. Eitt stórarbeiði var hoyggingin, og her máttu øll, eisini børnini, hjálpa til. At sláa var mannfólkaarbeiði. Olrikur og Jógvan beiggi máttu sláa frá tí, teir vóru 12 og 10 ára gamlir. Teir vóru systkinabørn í báðar ættir. Tað vóru fýra fóður at hoyggja. Olrik var javngamal við meg, og hann er nú her á Mørkini saman við konuni Gunnhild, dóttir Dánjal Klein. Mamma og mostir bóru alt inn. Tað ber illa til at ímynda sær alt hetta arbeiðið við hoyggingini.

Eg minnist eina gomla kona, tá ið eg fór at keypa eitt kvøldið. Hon helt, at vit oyðiløgdu hesar dreingirnar við at lata teir sláa alt. Men ikki bilti kortini, og teir gjørdust raskir menn.

## At ganga til neyta

Eitt stórarbeiði var eisini at ganga til neyta, og hetta gjørdu konufólkini. Neytini vóru øll í haganum á sumri. Nógv teirra vóru á Ambadali, meðan onnur vóru heimanfyri. Hesi vóru kallað Niðansneyt, meðan tey á Ambadali vóru Omansneyt. Tað var so stríggið at ganga á Ambadali, meðan tað var lættari at ganga Niðansneyt. Tey á Rætt og í Jákupsstovu høvdu Niðansneyt. Tey, sum høvdu eina kúgv, vóru til neyta fjórða hvønn dag, meðan tey, sum høvdu tvær kýr, vóru annan hvønn dag. Hetta var ein skiftisskipan millum neytakonurnar, at tær mjólkaðu hjá hvørjum øðrum og mjólkaðu tískil fýra kúm hvørja ferð. Mjólkin fór í hvør sína dyllu. T.v.s. at tá fýra kýr vóru mjólkaðar, hevði neytakonan fýra dyllur, tvær á bakinum og eina á hvørjum armi.

Sjálv fór eg at ganga til neyta, tá eg varð konfirmerað 14 ára gomul. At ganga norður á Ambadal var ein tími hvønn vegin. Tað kundi vera misjavnt, hvar neytini lógu, men roknast skuldi við trimum tímum fyri ferðina, og við byrði var tað eisini tungt at ganga. Lógu neytini niðri á Dalinum, var tað eisini mótbrekka at ganga niðanaftur, og tað við byrðu. Farið var til neyta á morgni og kvøldi, tískil fóru 6 tímar um dagin við hesum.

At ganga til Niðansneytini var styttri, men kundi eisini vera tungt, tí neytini gingu so víða um. Tað kundi eisini henda, at mjørki var, og tá kundu neytini vera sera ring at finna.

Tá eg var 16 ár, høvdu vit bara eina kvígu, sum kálvaði so seint. Mamma gekk til neyta fyri ommu í Jákupsstovu og eisini fyri tey á Rætt. Tá kom ein kona og spurdi, um vit vildu ganga til neyta uppá kúnna hjá teimum. Afturfyri skuldu vit fáa helvtina av mjólkini. Tá plagdi eg at fara.

Ofta hava fólk ræðst tarvar. Men eg minnist einki til trupulleikar av teimum. Teir gingu ofta saman við neytunum uttan at vera til ampa. Men mamma fortaldi onkuntíð um illar tarvar.

Í 1934 kom so ein regla um, at øll neytini skuldu liggja á Ambadali, men bert inntil 20. juli. Neytini á Ambadali mjólkaðu nevniliga so grúiliga væl í mun til neytini, sum lógu heimanfyri. Tískil skuldu øll hava møguleika fyri at hava neytini á Ambadali eins leingi, og so skuldu øll rekast heim um, og so skuldu hinir hagarnir hava neytini. Neytini kundu ikki liggja ov leingi í sama haga, so komu tey at ganga grasinum ov nær. Tískil komu øll at vera líka fyri.

## 50 børn í skúlanum.

Tað mesta eg veit um, hava verið 284 fólk við Gjógv. Tá vóru eisini so nógv børn. Eg minnist ikki neyvt talið á børnum, men eg minnist, at í elsta klassanum vóru vit einaferð 13 gentur, men ikki so nógvir dreingir. Í miðal mundu vera um 50 børn í skúlanum. Nú eru tey 2-3! Alla mína tíð var Johan Kallsoy einsamallur lærari. Hann var ættaður av Eiði, og gjørdist seinni lærari har. Hann var ein kendur politikkari og var tingmaður fyri sjálvstýrisflokkin í mong ár.

Undan míni tíð hevði Reynberg verið lærari bæði í Funningi og við Gjógv. Hans Marius Eidesgaard hevði eisini verið lærari við Gjógv. Tá mamma gekk í skúla, var Óli Dahl, vanliga kallaður Bedd-Óli, lærari við Gjógv. Hann var giftur til Funnings og slektaður úr Beddustovu í Dali. Men hann var bert aðru hvørja viku við Gjógv. Tá gisti hann í ymsum húsum í bygdini. Tá ið hann fór frá í 1912, kom ein úr Havn, sum æt Louvisa. Hon gisti í Lon.

Tá ið eg gekk í skúla, vóru tríggir klassar. Yngsti klassi, miðlinga klassi og elsti klassi.

Miðlingaklassi og yngsti klassi vóru í skúla týsdag, hósdag og leygardag. Elsti klassi var mánadag, mikudag og fríggjadag. Yngsti klasssi fór inn, tá miðlingaklassin fór út. Miðlinga- og elsti kassi fóru í skúla kl 8 á sumri, og í november byrjaðu teir at fara í skúla kl. 9. Í mars fóru tey aftur í skúla kl. 8. Sum sagt, var Kallsoy ein sjálvstýrismaður, so vit lærdu eisini føroyskt í skúlanum. Vit høvdu føroyska málløru og lærdu eisini at skriva føroyskt.

Annars var tabell tað fyrsta, vit lærdu í skúlanum. Um tann, sum ikki dugdi tabell, varð sagt, at hann fór heldur ikki at duga at rokna. Eg var rættiliga býtt, tá ið børnini hjá okkum fóru at ganga í skúla, at tey ikki lærdu tabell á sama hátt sum vit. Teirra lærari var Hans Kristiansen, men hann var eisini góður lærari, so nakað nógv kom kortini burturúr.

Tá Kallsoy var farin, kom ein suðringur Erling Mortensen, og var hann eisini lærari hjá okkara børnum. Hann føldi eisini ábyrgd fyri børnunum aftan á skúlatíð og royndi at fáa tey inn í hampiligari tíð um kvøldarnar. Hann var kortini ikki leingi við Gjógv.

Tá var tað, at Hans kom. Hann og Jógvan beiggi vórðu lidnir sum lærarar í 1950. Hans fór niður á lærarahaskúla, og tá hevði hann Poul Ejde fyri seg sum vikar. Hann var eisini góður lærari, og lærdi børnini hjá okkum væl. Poul var sonur H.C.W. Tórgarð, kendur havnarmaður, men var ættleiddur av mostur síni, Mariu Ejde, sum var lærari í Funningi í eitt mannaminni. Hon var kend sum mentakvinna, og gjørdist 100 ár. Mentaður var Poul eisini, og var serliga góður kvøðari og góður við føroyska dansin. Ikki av ongum var hann kallaður Dansi-Pól, eitt heiðursnavn. Hann giftist seinni við Hjørdis Thomsen av Geilabø í Norðragøtu, men tey doyðu bæði í besta aldri.

Sjúrður, sonur okkara, gekk í skúla hetta árið, Poul var við Gjógv. Tá Sjúrður var til upptøkuroynd á læraraskúlanum var Poul próvdómari.

## Komandi partur um Acorn

Í komandi parti greiðir Dinnafía frá, hvussu tey við Gjógv upplivdu skaðatilburðin umborð á Acorn í 1928, tá sjey mans, her av fýra gjáarmenn, brendu til deyðis. Vit kunnu siga beinanvegin, at hetta er ein einastandandi og ógloymandi frásøgn.



*Myndin er frá 1920-unum. Skúlin er miðskeiðis á myndini.*



*Her sæst Dinnafía saman við sínum systkjum. T.v. beiggin Jógvan, t.h. beiggin Óli. Sjálv situr hon undir Mariu*